# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantarnir í apríl 1919



Hesir 15 konfirmantarnir blivu fermdir í Havnar kirkju tann 19. apríl 1919:
Afasta rað f.v.: Edith Oluffe Sofie Olsen (hjá Sam), Mariane Hansen (Nólsoy), Ingrid Sophie Egholm (hjá Hans Jacob Egholm), Kristine Jensine Henriette Djurhuus (Kollafjørður) og Nicolina Susanna Poulsen (hjá Poul Jóhs. Poulsen).

Mittasta rað .f.v.: Olivia Arge (Liffa hjá Sigmund av Argjum), Gudrun Margrethe Hansen (Gugga hjá Gynnu), Bodil Frida Mohr (Bodil hjá Jens Mohr), Anna Sofie Isabella Jacobsen (Mykines) og Andrea Udbø (Dea hjá Óla Udbø).

Fremsta rað .f.v.: Knud Esbern Hansen (Borðan), Samuel Sofus Rubeksen (Sámal í Smiðjustovu), Johan Esbern Christian Simonsen (Johan í Hoyvík), Rasmus Poulsen (Rasmus á Kák) og Jon Ædel Sofus Matthias Simonsen (John hjá Magnus Sivard).

## Eigur onkur konfirmantamynd frá 1933?

Er tað nakar av lesarunum sum eigur myndina av konfirmantunum á vári 1933? Um so er, verða tey vinarliga biðin um at ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

Konfirmantarnir vóru: Jóannes Patursson (Kirkjubøur), Marius Ziska (Havn), Morten Meinhard Mørk (Havn), Vilhjálmur Mohr Patursson (Kirkjubøur), Hans Ingvard Johansen (Argir) Poul Skeel Nolsø (Kaldbak), Gunnar Hansen (Havn), Napoleon Mortensen (Argir), Hilmar Poul Edmund Joensen (Borðan), Hans Marius Nybo (Hestur), Amalie Bergitte Malfred Simonsen (Norðradalur), Jona Mortensen (Havn), Anna Christine Mikkelsen (Havn), Aase Ringberg (Havn), Svanhild Franciska Justinussen (Havn), Anna Jacobsen (Havn), Birita Maurentza Alberg (Havn), Anna Helene Haraldsen (Havn), Juliæ Hansen (Nólsoy), Kathrine Michelsen (Havn), Petra Andrea Olsen (Havn), Elsebeth Johanne Amalie Karoline Torsvig (Hestur) og Poula Sofie Hansen (Havn).

†

## Andlát og jarðarferðir

**Andreas Richardt,** vanliga nevdnur Diaba, Sumba, andaðist leygardagin 22. oktober, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Dagurin**

**25. oktober. Crispinus,** deyður umleið ár 300. Hann og bróðurin Chrispianus flýddu úr Róm undan Diocletiani keisara, og búsettust sum skósmiðir í Soissons í Fraklandi. Men tá tað kom upp, at teir vóru kristnir menn, vórðu teir tiknir av døgum.